## Oljuprísur fellur framvegis

118 dollarar er 30 dollarar minni, enn prísurin var fyri bara einum mánaði síðani og samstundis lægsti prísur teir seinastu tríggjar mánaðirnar, skrivar AP. Ein orsøk er, at framleiðslan hjá OPEC-londunum veksdur støðugt, og haraftur at minkar eftirspurningurin í USA. Serfrøðingar ávara kortini um, at illveðrið í Meksikanska Flógvanum kann fáa prísin at hækka aftur, men tað tykist, sum at oljupallarnir har sluppu undan tí ringasta.





*Kristian Fríðrik Olsen situr í borgarstjórastólinum í Klaksvík, meðan Steinbjørn O. Jacobsen er í summarfrí*
*Mynd: Rógvi Nybo*

# Festivalurin stóran týdning fyri býin

**- Vit eru øðrvísi enn onnur, og vit eru ikki bangin fyri at vísa tað. Summar Festivalurin og Sjómannadagurin eru tvey dømi um, at vit ikki eru kopi av nøkrum øðrum, og hesi bæði tiltøkini hava stóran týdning fyri býin, tí tey seta veruliga Klaksvík á kortið, sigur Kristian Fríðrik Olsen, virkandi borgarstjóri**

FESTIVALUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Norðoyastevnan hevur áður verið tað tiltakið, sum hevur savnað mest fólk í Klaksvík. Men nú man nýggja tiltakið í býnum, Summar Festivalurin, vera tann, sum dregur flest fólk norður til næststørsta bý í landinum.

Í ár eru tiltøkini í fiskivinnu háborgini kortini um at verða vavd upp í ein vavgreyt. Tey koma so, peu an peu. Summar Festivalur, síðani 100 ára haldið hjá Klaksvíkar kommunu og at enda Sjómannadagurin. Tað slítur ikki ímillum.

- Nú hava vit sum so ikki tað heilt stóra at gera við Summar Festivalin. Tað er eitt privat partafelag, sum skipar fyri honum. Tað einasta, kommunan skal syrgja fyri, eru ytru karmarnar, sigur Kristian Fríðrik Olsen, ið virkar sum borgarstjóri, meðan Steinbjørn O. Jacobsen hevur summarfrí.

Men treyðugt so er altíð eitt og annað at tríva í hjá kommunuarbeiðarunum.

- Tað er serliga vegadeildin og býargartnarin, sum hava nógv at gera hesar dagarnar upp undir festivalin, við at fríðka um í býnum, so alt kann verða so snøgt og hugnaligt, sum til ber, nú vit fáa vitjan av so mongum festivalgestum, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

Annars hevur tað verið 100 ára haldið hjá Klaksvíkar kommunu, sum hevur upptikið býráðið í serligan mun, og hetta haldið verður komandi vikuna.

### Býurin væl fyri

Annars heldur virkandi borgarstjórin, at býurin er væl fyri at taka ímóti teimum mongu festivalgestunum.

- Vit veita tekniska hjálp til tjaldøkið, og vit hava slættað eitt øki í miðbýnum til húsvagnar. Haraftrat hava vit valt at lata nýggja ringvegin upp, hóast hann ikki er heilt liðugur enn; hann vantar millum annað vegaskelti, men hann tekur so ein stóran part av trýstinum í ferðsluni, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

Partar av vegakervinum í miðbýnum verða stongd, og tí verður neyðugt at umskipa busskoyringina nakað hesar dagarnar.

Eisini Klaksvíkar Havn, sum mánadagin fekk nýggjan havnarstjóra, er til reiðar at taka ímóti mongu bátunum, ið plaga at koma á Summar Festivalin.

- Bátafólkið heldur ógvuliga væl saman, og tey eru eitt fólkaslag fyri seg. Tey hugna sær óført umborð á bátunum og á festivalinum, liva mest sum sítt egna lív, sigur virkandi borgarstjórin í Klaksvík.

Tað skuldi tískil alt verið klárt frá kommununnar síðu at taka ímóti festivalgestunum, antin teir koma yvir land ella sjógv.

### Stóran týdning

Fyri býin sjálvan hevur Summer Festivalurin stóran týdning.

- Klaksvík verður veruliga sett á kortið í sambandi við festivalin, og tað hevur stóran týdning fyri okkum. Nógv verður tosað um, at vit kappast móti Havnini, men tað er ikki so, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

Hann vísir á, at Klaksvík var fyrst við ítróttarhøll og svimjihøll, og hetta verður ofta gjørt á royndarstigi, og tað kostar. Men hann sigur, at klaksvíkingar eru øðrvísi enn onnur og eru ikki bangnir fyri at vísa tað.

- Vit eru ikki fjølrit av nøkrum øðrum. Tvørtur ímóti, so eru vit stoltir av at vera originalir, sigur virkandi borgarstjórin.

Hann vísir á, hvussu nógv truplari tað er úti á bygd at fáa eitt tiltak at mæla runt.

- Í Havnini nærmast svimja tey í pengum, har ber alt til. Uttan fyri høvuðsstaðin er straks truplari, men Summar Festivalurin hevur víst, at tað ber til, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

Og suksein hjá festivalinum smittar eisini av á handilslívið í býnum.

- Tá so nógv fólk koma til Klaksvíkar sigur tað seg næstan sjálvt, at nøkur oyru liggja eftir teimum, so eisini í so máta hevur festivalurin eina positiva ávirkan á býin, sigur Kristian Fríðrik Olsen, virkandi borgarstjóri í Klaksvík.